LM-065/2025

FYLGISKJAL 4

Alda Joensen

Fra: Heilsumálaráðið
Sendt: 3. november 2025 15:40
Til: Almanna- og mentamálaráðið
Emne: Heilsumálaráðið: 25/14176 - Til HOYRINGAR - Uppskot til broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til yrkisleiklist v.m.
Vedhæftede filer: DOC_20251103153746.pdf

Góðan dag,

Hjálagt er hoyringarsvar frá Heilsumálaráðnum.

Vinaliga

Heilsumálaráðið

Fra: Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>
Sendt: 3. oktober 2025 14:15
Til: Tjóðpallur INFOboks <info@tjodpallur.fo>; leikarafela@leikarafelag.fo; Mentanargrunnur Landsins <mentan@mentanargrunnur.fo>; Listafólkasamband Føroya <lisa@lisa.fo>; maf@maf.fo; ronn@fuglafjordur.fo; Annfinnur Heinesen <annfinnur@varpid.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>; Barna- og útbúgvingarmálaráðið <bumr@bumr.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Løgmálaráðið <lmr@lmr.fo>; lms@lmr.fo
Cc: Eyðun Mohr Hansen <Eydun@ammr.fo>; Eyðun Mohr Hansen <Eydun@ammr.fo>; Torkil Vestergaard Rasmussen <TorkilR@ammr.fo>; Alda Joensen <AldaJ@ammr.fo>
Emne: 25/14176 - Til HOYRINGAR - Uppskot til broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til yrkisleiklist v.m.

Góðan dag,

Við hesum verður uppskot til broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til yrkisleiklist v.m. sent tykkum til ummælis.

Skotið verður upp at umskipa leistin fyri stuðli til yrkisleiklist soleiðis, at tað frameftir verður Mentanargrunnur Landsins, sum eftir tilmæli frá nøkrum sakkønum ráðgevum, fer at taka avgerðir um stuðul til yrkisleiklist. Mentanargrunnurin umsitur frammanundan eina røð av stuðulsskipanum. Stuðulin til yrkisleiklist skal hava sína egnu stuðulsjáttan á fíggjarlógini, soleiðis at skilnaður er millum hesa játtan og aðrar játtanir, ið Mentanargrunnurin umsitur. Sami leistur er gjørdur fyri filmsstuðulin, ið upp til 31. des. 2024 lá beinleiðis undir landsstýrisfólkinum.

Endamálið við broytingini er at tryggja armslongd frá politisku skipanini, sum eisini stendur í samgonguskjalinum.

Skotið verður eisini upp at broyta heitið "leiklist" til "palllist", sum verður mett at vera eitt breiðari hugtak, ið fevnir um øll viðkomandi sløg av list at pallseta.

Við uppskotinum fær Leiklistaráðið hjá Tjóðpallinum, frameftir nevnt Palllistaráðið, varafólk, og Palllistaráðið fær samstundis betri umstøður at hugsavna seg um virksemið á Tjóðpallinum saman við stjóranum.

LM-065/2025

Møguligar viðmerkingar verða at senda til ammr@ammr.fo **í seinasta lagi mánadagin 3. november 2025 kl. 12:00**.

Vinarliga / *Kind regards*

ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Social Affairs and Culture

Eirargarður 2 / FO-110 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 304000 / ammr@ammr.fo / www.ammr.fo

LM-065/2025

HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Almanna- og mentamálaráðið
Eirargarður 2,
100 Tórshavn

3. november 2025
Mál: 25/26793-2
Tygara Skriv: 25/14176
Viðgjørt: as

Hoyringarsvar til uppskot til løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til yrkisleiklist v.m.

Heilsumálaráðið hevur móttikið uppskot til løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til yrkisleiklist v.m., til hoyringar.

Heilsumálaráðið hevur lisið lógaruppskotið og mett um, hvørt lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri heilsuøkið.

Heilsumálaráðið metir ikki, at lógaruppskotið hevur serligar avleiðingar fyri heilsuøkið og hevur ikki aðrar viðmerkingar.

Vinaliga

Áud í Søylu
samskipari